# Heilsutrygdin ein skattalætti?

TÓRBJØRN JACOBSEN



"Fólkaflokkurin hevur ta áskoðan, at táið hetta gjaldið fellur burtur, so skal tað virka sum ein skattalætti fyri øll tey, sum hava goldið hetta inn, og tá fara tey, sum hava lægst inntøku, at fáa tann størsta skattalættan, og tí meina vit, at hesar 104 milliónirnar skulu ikki takast inn sum ein meirskattur, men tær skulu finnast í reellum sparingum…"

Tað er ikki hvør sum helst, ið hevur útbasúnerað hesi orðini. Undir aðru viðgerðini um nýggju heilsutrygdina, staðfesti formaðurin í trivnaðarnevnd løgtingsins, Jákup Mikkelsen, at ongin ætlan, og tíansheldur nøkur semja, er gjørd í samgonguni um, hvussu nýggja heilsutrygdin skal fíggjast eftir 31. desember 2011 – um tvey ár.

Hesi greiðu boðini, frá parlamentariska oddvitanum í almanna- og heilsumálum, standa í grellari andsøgn til mangt av tí, sum sagt og skrivað er, um umskiftið frá gomlu sjúkrakassaskipanini til hina nógv umrøddu almennu heilsutrygdina, ið sigst vera farin til verka, nú ársskiftið smoygdi sær framvið okkum.

Táið hin legendariska CHE-samgongan legði til brots, fyri sløkum tveimum árum síðani, var niðurfelt í samgonguskjalið, at: "Sjúkrakassagjaldið verður lagt inn í skattin. Sergjaldsskipan um sjúkrakassagjald verður gjørd fyri tey, sum hava skattafríar nettoinntøkur." Hendan ásetingin ger greitt, at ætlanin frá fyrsta degi var, at gamla proportionala nevgjaldið (sama gjald fyri hvørt nevið), sjúkrakassagjaldið, skuldi konverterast inn í progressiva skattastigan, og at skatturin skuldi hækkast samsvarandi, fyri at fíggja alla flytingina og ábøturnar, frá meiri ella minni privatu sjúkrakassunum til landskassan.

Nú er nýggja heilsutrygdin samtykt á tingi, eisini við okkara atkvøðum, men vit royndu til tað síðsta, at tryggja skipanini eina fígging í framtíðini, við at seta uppskot fram um, at hon longu frá nýggjárinum kom undir almennu landsskattaskipanina. Hetta eydnaðist ikki, og nú hongur skipanin í leysum lofti, um Fólkaflokkurin fær makt sum hann hevur akt, í hvussu er í síni latentu realpolitiskt psykologisku yvirvág mótvegis Javnaðarflokkinum.

Áður sótu føroyingar alspentir og bíðaðu eftir nýársrøðu løgmans, men makan til tóma røðu, sum hesa feskastu, hevur ongin løgmaður higartil megnað at flutt fram, síðani danska heimastýrislógin varð smoygd niður um høvd, herðar, lendar og øklar okkara. Løgmaður, sum livir í sínum egna veruleikafjara Leolandi, mælir m.a. fyri munni: "Í morgin skriva vit ein nýggjan kapitul í heilsusøgu Føroya, tá nýggj skipan við almennari heilsutrygd kemur í gildi. Skipanin er samhaldsføst og ger umsitingina smidligari og bíligari. Ein meginregla er, at tey, sum hava størsta tørvin á heilivági, fáa mest í stuðli."

Tað er rætt, at ávísir veikir bólkar fáa ein bata í útgjaldinum, fáa eitt størri útgjald, men at rópa skipanina fyri eina samhaldsfasta skipan er eitt stórt bluffnummar. Næstu tvey árini heldur proportionala inngjaldingin, nevskatturin, fram á sama hátt sum í gomlu skipanini. Eftir tað veit ongin hvussu leikur fer. Sambært absolutta parlamentariska oddvitanum í almanna- og heilsumálum, fólkafloksmanninum Jákupi Mikkelsen, stendur og fellur fíggingin til nýggju heilsutrygdina eftir 31. desember 2011 – um sløk tvey ár – við hvussu vøddamikil táverandi heilsumálaráðharrin er, táið raðfestast skal í fíggjarlógargerðini. Heilsutrygdin er harvið, í fólkafloksoptikkinum, vorðin ein kastibløka millum inntøkutrygd, tunlar, almenna forsorg o.s.fr.

Harvið kann staðfestast, at fyrireikingararbeiðið í málinum als ikki er í lagi, fíggingin hongur í leysum lofti, og kann bara tryggjast í eini politiskari semju kring um Fólkaflokkin, ið rættiliga bersøgið hevur gjørt sínum samgonguflokkum greitt, at heilsutrygdin, ið Aksel Vilhelmsson arvaði frá CHE-samgonguni, og sum síðani varð maltrakterað í kvørnini hjá Fólkaflokkinum, skal skiljast sum ein skattalætti á 104 milliónir krónur. Máti skal vera við, at verða tikin við brókunum niðri á politisku øklunum. Hinvegin skal landsstýrismaðurin tó ikki ivast í hjálpini frá Tjóð . veldinum, táið útvegir skulu finnast fyri at fáa hesi viðurskiftini í rættlag, ið hann nú er so illa skølsettur av.

Minnist, at ein eldri kona í Gøtu, einaferð í óvitaárunum, segði um eina aðra væl til árs komna konu, at hon hevði limað seg úr samfelagnum. Onkur spurdi hví, jú, varð svarað, hon hevði meldað seg úr sjúkrakassanum. So fundamental hevur sjúkrakassaskipanin verið í hugaheimi fólksins, og skal hon nú hoyggjast til í neoliberala universinum hjá Fólkaflokkinum, so er spurningurin um vit ikki hava rættað bakara fyri smið.

Hetta alt, ímeðan nú- og fyrrverandi landsstýrismenn brúka geografisku plaseringina á Føroyakortinum sum lokalpolitiskt valagn hjá sær sjálvum, í einum pseudostríði, sum onki hevur við kjarnuna í málinum at gera. Enn er onki argument fyri staðsetingini farið inn undir húðina á nøkrum livandi skapningi, so tóm, egorelaterað og flosklakend tey hava verið frá diverse aktørum.

Harvið veri ikki sagt, at nýggja heilsutrygdin ikki skal virka úr Klaksvík. Heldur enn gjarna, men málið snýr seg nú einaferð um at tryggja fólkinum fíggingina til eina fundamentala og serliga vitala trygdarskipan, sum helst skal verða betri enn gamla sjúkrakassaskipanin, annars hava vit fingið minni fyri meira. Hetta gerst bara, um politiska skipanin, Fólkaflokkurin excl., alt fyri eitt fer undir at samráðast um, hvør fíggingarleistur loysir nevskattin av, táið tvey ár eru umliðin, tess kvikari vit eru á takinum, tess tryggari verður fólkið í mun til hesa heilsuligu grundskipan samfelagsins.

Málið snýr seg um at skottryggja fólkinum eina heilsutrygdarskipan, og ikki um at tryggja tveimum eykavaldum tingmonnum ein sess á Føroya løgtingi, nú táið føroyingar mega fáa eitt val, ikki bara fyri at tryggja omanfyri umrøddu skipan, men fyri at tryggja alt samfelagið ímóti tí ørmundargongd, ið var staðfest, í tí burturav fátæksligu røðuni løgmaður flutti teknum sínum gamlaárskvøld. Var hon eksponenturin fyri ætlanum samgongunar, og er Andrass Samuelsen nú vorðin hugmyndafrøðingurin hjá sjálvstýrismonnunum í samgonguni, tá kann bara staðfestast, at hetta regime punkteraði á hálvari leið í valskeiðnum. Eitt politiskt siðaskifti er átrokandi neyðugt, skal nøkur vón verða um bata fólksins og samfelagsins.

# Nútímansgerð er neyðug

HENRIK OLD



Tá uppsagnarreglurnar í sínari tíð komu inn í sáttmálan millum Fiskimannafelagið og

Reiðarafelagið, var hetta at rokna sum eitt stórt framstig fyri fiskimannin. Nú tykast partar av uppsagnarreglunum verða ein forðan fyri, at fiskimenn koma undir somu treytir sum onnur í ALS skipanini.

Tá bæði Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið eru greið yvir, hvørjar treytir ALS stýrið setur fyri, at afiskimenn koma í ALS skipanina, tá ið skip liggja í eitt óvist tíðarskeið, so eigur at bera til at laga tann partin av uppsagnarreglunum soleiðis, at fiskimenn hava somu treytur sum onnur, tá ið teirra vinnutól liggur stilt í longri tíð.

Øll sum hava havt við skip at gera kenna trupulleikan, tá ið skip til dømis skal á beding.

Roknað verður við, at yvirhálingin tekur kanska tvær vikur. Tá arbeiðið er byrjað, so kemur ein rúgva av øðrum tingum undan kavi, sum eisini eru neyðug at gera, áðrenn skipið sleppur frá kai aftur, tað verður seg krav frá Skipasýninum, klassa og mangt annað.

Er talan um eitt eldri skip, so kann lættliga tann fyrsti mánaðurin og meiri enn tað ganga, áðrenn loyst verður aftur. Mong dømir eru um, at tað sum var ætlað at taka tvær vikur, kom at taka seks vikur. Alla hesa tíðina gongur manningin uttan nakra krónu.

Tað var harmuligt, at roynd ikki var gjørd at broyta tann partin av uppsagnarreglunum, nú samráðingar vóru millum partarnar stutt undan jólum.

Eg eri ikki í iva um, at um øll trý manningarfeløgini samdust við reiðarafelagið um at gera eina roynd í eitt ár at annulera uppsagnarreglurnar, um tá skip koma at liggja í óvissa stytri tíð, men samtíðis hildið fast við restina av uppsagnarreglunum, so høvdu fiskimenn komið í ALS skipanina á sama hátt sum onnur.

Tað hevði verið spennandi at sæð, hvussu eitt royndarár hevði gingist. Truplari enn tað er nú, kann tað neyvan blíva.

# Torbjørn og Høgni villleiða

AKSEL V. JOHANNESEN
heilsumálaráðharri



Torbjørn Jacobsen og Høgni Hoydal bóru fram ávikavist tann 3. januar í Útvarpi Føroya og tann 4. januar í Sjónvarpi Føroya, at Heilsutrygdin ikki er samhaldsføst. Báðir føra teir fram, at skipanin onga fígging hevur eftir 1. januar 2012. Hetta er ikki rætt.

**Skipanin er samhaldsføst**

Útgjaldið úr Heilsutrygd verður munandi meira samhaldsfast enn eftir gomlu skipanini. M.a. er ein heilt nýggj skipan fyri heilivágstilskot partur av nýggju lógini. Heilivágstilskot verður nú latið eftir einum progressivum leisti, soleiðis at borgarar, sum brúka nógvan heilivág, rinda lutfalsliga minni enn tey, ið brúka lítið av heilivági.

Eisini er ásett hámark fyri, hvussu nógv borgarar skulu gjalda í egingjaldi fyri heilivág. Ung undir 18 ár og eldri yvir 67 ár koma sambært nýggju lógini ongantíð at gjalda meira enn 1.195 krónur um árið fyri heilivág. Hjá teimum í aldrinum 18 til 67 ár er egingjaldsmarkið 1.600 krónur um árið.

Grundreglan handan hesar broytingar er tann, at tað ikki eigur at verða ein fíggjarligur smeitur fyri tey, ið vegna sjúku hava tørv á nógvum ella kostnaðarmiklum heilivági.

**Sjúkrakassagjaldið er tikið av**

Fram til 1. januar høvdu vit 11 sjúkrakassar í Føroyum, sum hvør í sínum lagi ásettu sítt egna sjúkrakassagjald. Gjaldið var rættiliga ymiskt frá sjúkrakassa til sjúkrakassa. T.d. var mánaðarliga gjaldið í Fuglafjarða sjúkrakassa einans 175 kr., meðan tað í t.d. Sandoyar sjúkrakassa var heilar 310 kr.

Hetta er nú broytt til eina meira samhaldsfasta inngjaldsskipan. Næstu tvey árini fara øll at rinda sama gjald, uttan mun til, um borgarin býr í einum av teimum sterkaru ella einum av teimum veikaru økjunum í landinum.

Við lógini um Heilsutrygd er sjúkrakassagjaldið eisini tikið av frá 1. januar 2012. Tað framgongur greitt í lógartekstinum, sum eitt næstan einmælt løgting hevur samtykt, at sjúkrakassagjaldið fellur burtur tann 1. januar 2012 og verður flutt inn á samhaldsføstu landsskattafíggingina, har breiðastu herðarnar fara at bera lutfalsliga meira.

**Gjaldið yvir skattin í 2012**

Tað er ikki rætt, sum bæði Høgni Hoydal og Torbjørn Jacobsen bera fram, at lógin ikki ásetur, hvat skal henda eftir henda dag. Tað framgongur greitt av bæði lógartekstinum og viðmerkingunum til lógina, at gjaldið verður tikið inn yvir skattin frá og við 1. januar 2012.

Tað er rætt, at tað ikki framgongur av lógini um Heilsutrygd, um ella hvussu hetta skal takast inn yvir skattin til ta tíð. Tílíkar ásetingar hoyra heldur ikki heima í eini lóg um Heilsutrygd. Heilsutrygdin lóggevur um stuðul til heilusveitingar. Hvussu okkara skattalóggáva skal verða samanskrúvað, er eitt skatta/fíggjarmál og ikki eitt heilsumál, og hvørki kann ella eigur hetta at verða regulerað í eini lóg um Heilsutrygd. Tað vita royndir politikarar sum Torbjørn Jacobsen og Høgni Hoydal fullvæl, og tí eru teirra útsagnir ikki annað enn gykl og villleiðing.

Mett verður, at sjúkrakassagjaldið fer at geva landskassanum eina inntøku á 104 mió. kr. í 2010. Tá sjúkrakassagjaldið fellur burtur tann 1. januar 2012, missir landskassin hesa inntøku.

Tað er altíð neyðugt at føra ein fíggjarligan ábyrgdarfullan politikk, ikki minst í hesum tíðum, tí eri eg samdur við Høgna Hoydal og Torbjørn Jacobsen í, at neyðugt verður at broyta skattastigan í skattalógini til ta tíð, soleiðis at landskassin fær tær mistu 104 milliónirnar í sjúkrakassagjaldi meira inn á samhaldsføstu landskattafíggingini. Eg ivist onga løtu í, at allir flokkar eru so mikið ábyrgdarfullir, at teir fara at taka undir við teimum neyðugu tillagingum í skattalógini, sum mugu gerast til ta tíð.

Tað munar tó lítið at taka sjúkrakassagjaldið inn yvir skattin í 2012, um Tjóðveldi samstundis fær sína vilja og minkar ríkisveitingina við umleið 120 mió. um árið tey næstu fimm árini til hon er heilt burtur í ár 2014.

*Hoyvík, tann 4. januar 2010*